# TILTØK

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536
ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir:
mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur:
radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða:
www.radgevingin.dk

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.n-orden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtíð týsdag kl. 17-18.
Kórvenjing týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólíka vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Áarstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altíð vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Århus.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nærvarpið LUMI radio í Aalborg**
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussar nr 2A og 12 steðga tætt við Kristnastovu.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.30 og verður endursend leygarkvøld kl. 19.30.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit eru vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

## Brúdleyp

Hósdagin 14. juli *giftust* Maria Mikkjalsdóttir Johannesen, Sandur og Kári Olsen, Klaksvík.

Í dag, 16. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Anja Djurhuus úr Tórshavn og Hanus Vilhelm úr Hoyvík. Um kvøldið verður veitsla á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Í dag, 16. juli kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Katrin á Borg Gaard, Hoyvík og Holgar Johannesen, Sandavágur. Veitslan verður fyri innbodnum í Meinigheitshúsinum í Tórshavn kl. 19.00. Um tit vilja gleða brúðarparið, verður brúðarhús á Lýðarsvegi 8, sunnudagin 17. juli.

Í dag, 16. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Mia Krog Elisdóttir av Sandi og Steen Hjartan Sørensen úr Trongisvági. Veitslan verður fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.00.

Í dag, 16. juli kl. 10.00 giftast í Sandavágs kirkju Rúna á Rógvi Simonsen, Vestmanna og Jákup Olsen Thomassen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin til nátturða og køkur í ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00.

Í dag, 16. juli kl. 13.00 giftast í Berøa, Saltangará Linda Højgaard, Saltangará og Goodwin Sunder Edwin, Mysore, India. Døgurði verður fyri innbodnum á Sjókaféini í Runavík og opið hús verður eisini á Sjókaféini frá kl. 20.00.

Í dag, 16. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju, Jóna G. Jacobsen úr Hvalba og Poul Laust Christiansen av Argjum. Um kvøldið verður nátturði fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum.

Fríggjadagin 22. juli 2005 kl. 16.30 giftast í Dómkirkjuni Beinta Fossádal, Tórshavn og Halldór Matthias Sigurðsson, Reykjavík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Freerslev kirkju á Sælandi, Flóvin þór Næs úr Havn og Birgitte Kragh Nygaard úr Haslev. Brúdleypsadressan er Sørup Herregaard, Sørupvej 26, DK-4100 Ringsted.

Leygardagin 23. juli kl. 18.00 giftast í Dómkirkjuni Jónrit Nielsen og Erling Dalsgaard, Tórshavn. Veitslan verður í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Hirtshals kirkju, Eilin Hentze og Dan-Kári Joensen, Skopun. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum eru vælkomin til Kathrinu og Dánial Joensen, Kærvej 35, Hirtshals frá kl. 20.00.

Leygardagin 23. juli kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Eina Hansen og Kristian Eliasen. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 19.00.

Leygardagin 23. juli kl. 17.00 giftast í Dómkirkjuni Joan Joensen, Tórshavn og Jens Jacob Nissen, Søborg. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 23. juli kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Súsanna Gaard, Klaksvík, og Ólavur S. Hansen, Norðoyri. Veitslan verður fyri innbodnum í kantinuni á Kósini kl. 18.30.

Leygardagin tann 30. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Elin S. Joensen, Miðvágur og Tór-Ingar Akselsen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í SÍF-húsinum í Sandavági frá kl. 20.30.

Leygardagin 30. juli kl. 14.00 giftast í Betania í Skopun Davia Gertrud Nicolajsen, Skopun og Hans Jacob Reinert Petersen, Saltnes. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru vælkomin inn á gólvið hjá Arndis og Jógvan Hendrik Nicolajsen, Skopun, frá kl. 19.00.

Sunnudagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Viðareiðis kirkju Jóhan Sjóstein av Viðareiði og Julianna O. W. Høgnesen úr Klaksvík. Vælkomst verður í heiminum eftir kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum, May í Túni og Jan Højgård, Toftir. Veitslan verður kl. 18.00 á Svangaskarði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449640, 260817, 447647 ella 227230 áðrenn 28. juli.

Leygardagin 6. august kl. 14.00 giftast í Sjóvar kirkju Anna Elisa Jógvansdóttir, Innan Glyvur og Jimmi Højrup Jepsen, Esbjerg. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin um at boða frá á tlf. 447495, 272740 ella 252361, ella skriva til aj_elisa@hotmail.com áðrenn 20. juli.

Leygardagin 13. august kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni, Rannvá Lind Helgadóttir, Vestmanna og Borgar Hansen, Nes. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 449988, 424511, 584430 ella 504040 innan 1. august.

Fríggjadagin 19. august kl. 15.00 giftast í Ebenezer í Tórshavn, Rakul Andreassen, Tórshavn og Eyðfinn Olsen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við atkoma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 226922 ella 229516.

Leygardagin 20. august kl. 14.00 giftast í Kollafjarðar kirkju, Marin Tórhalla Luid úr Miðvági og Esmar Elias Sofus Petersen, Kollafjørður. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum vera biðin um at siga frá í seinasta lagi 8. august á tlf. 581614, 421150, ella 333312.

Leygardagin 3. september kl. 14.30 giftast í Vágs kirkju Vima Beck, Lopra og Bjarti Nattestad, Hvalba. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 373972, 504530, 375067 ella 314543 innan 14. august.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 19. juli kunnu hjúnini Jensina og Jónsvein Simonsen, Saltangará, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Runavíkar Sjómansheimi fyri innbodnum kl. 19.00.

18. juli kunnu hjúnini Elken og Arne Simonsen í Hvannasundi halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 23. juli á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma kunnu siga frá innan 15. juli á tlf. 452115 ella 221933.

26. juli hava Ann-Bjørg og Sunnleif Jacobsen, Sandavágur, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 23. juli. Opið hús verður í Missiónshúsinum í Sandavági frá kl. 15.00 til 21.00.

Týsdagin 9. august kunnu hjúnini Eydna og Bartal Kass, Argir halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 13. august. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið eru vælkomin í neystið – har borðreitt verður við stóra kalda borðinum – og verða vinarliga biðin um at boða frá á tlf. 316456 ella á tlf. 221310 innan 1. august.

## Gullbrúdleyp

Mánadagin 18. juli kunnu hjúnini Olga og Tórálvur Mohr halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Leygardagin 30. juli hava Elin og Høgni Poulsen í Tórshavn verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin við vælkomsti kl. 18 í heiminum hjá Ingu og Marjus Dam, Miðvági.

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

KAMPANJUAVSLÁTTUR
UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR
BILAR